# Nýtt stað til læknan í Kollafirði

**Viðtaluhøli verða nú bygd í miðstaðarøkinum í bygdini. Kostnaðurin er settur til góðar 3,3 mió. kr.**

LÆKNAVIÐURSKIFTI

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Fyrst helt læknin til í skúlanum í Kollafirði. Síðani varð hann fluttur í gamla skúlan, men nú skal læknin so fáa eitt nýtt høli til sínar viðtalur í bygdini.

Tórshavnar býráð samtykti nevniliga á fundi í farnu viku at loysa hølisviðurskiftini hjá kommunulæknanum í Kollafirði sum skjótast.

Arbeiðið fer at byrja seinni í ár, men verður kortini neyvan liðugt fyrrenn komandi ár. Í ár eru játtaðar 2,5 mió. til arbeiðið og 600.000 kr. komandi ár.

Nýggju læknahølini koma at liggja í nýggja miðstaðarøkinum nærhendis skúlanum í bygdini.



*Kommunulæknin í Kollafirði fer nú aftur at fáa pláss nærhendis skúlan í nýggjum viðtaluhølum. Hesi børnini kunnu tí gleða seg um at hava stuttan veg til lækna, um nakað verður áfatt í skúlatíðini*

*Savnsmynd*

### Nýtt miðstaðarøki

Í eina tíð hevur verið arbeitt við at útbyggja skúlan í Kollafirði. Umframt skúlastovur hevur eisini kommunulæknin havt sítt tilhald í hesum bygningi.

Men undir arbeiðinum við útbyggingini varð neyðugt at flyta læknan úr sínum viðtaluhøli í skúlanum.

Sum eina fyribilsloysn varð avgjørt, at viðtalan í eina tíð skuldi fara fram í tí gamla skúlanum í Kollafirði. Samstundis við hetta helt arbeiðið fram við at kanna og lýsa hølistørvin hjá kommunulæknanum.

Ein arbeiðsbólkur varð settur at gera eitt uppskot til eina loysn til nýtt viðtaluhøli. Í hesum arbeiðinum skuldi ein somuleiðis kanna møguleikarnar fyri at heimasjúkrasystrarnar skuldu fáa høli í sama staði. Undir kanningararbeiðinum kom ein skjótt fram á staðið, har eitt slíkt viðtaluhøli kundi liggja: Á nýggja miðstaðarøkinum, har læknahølini kundu byggjast norðan fyri ítróttarhøllina og skúlan í bygdini.

### Størri bygning fyri sama prís

Sambært fyrsta uppskotinum skuldi talan verða um ein bygning sum var 186 fermetrar stórur og sum mettur varð at kosta góðar 3,3 mió. kr.

Fíggingin av hesum bygninginum verður gjørt soleiðis, at ein hevur tikið 300.000 kr. av íløguætlanini fyri 2004, og at restupphæddin verður játtað við 2,5 mió. kr. av íløguætlanini í ár og 600.000 av ætlanini fyri komandi ár. Ílalt kosta nýggju læknahølini 3,348.000 kr., og tá eru útgerð, innbúgv og MVG íroknað.

Seinni hevur ein kortini broytt hetta uppskotið nakað, so bygningurin er vorðin nakað størri, men har prísurin kortini er óbroyttur.

Fundir hava verið í fleiri nevndum í Tórshavnar býráði, har henda ætlanin er viðgjørd. Kollfjarðarnevndin hevur havt málið til viðgerðar, og hevur hon eisini mælt til at samtykkja uppskotið.

Og á fundi í býráðnum seinasta hóskvøld varð uppskotið samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

## KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 8, 2005
www.kaupthing.fo

# Prísvøkstur í andgletti

MARKNAÐARRÁK

Stórur spenningur var á fíggjarmarknaðunum, tá amerikanski tjóðbankastjórin, Greenspan, helt sína hálvárligu røðu um búskaparlig útlit og peningapolitikk í senatinum mikudagin í farnu viku. Sum so var einki nýtt í røðuni. Hann er bjartskygdur viðvíkjandi búskaparligu gongdini í USA, og metir, at hækkandi húsaprísir og partabrævakursir framvegis stuðla øktari privatari nýtslu.

Greenspan nevndi sera lágu lánsbrævarenturnar, sum hann hvørki helt hóska til búskaparligu støðuna ella tær áhaldandi hækkingarnar av leiðandi rentuni. Hann tosaði eisini um, at framleidnið er lækkað. Hetta kann elva til hægri prísvøkstur, eitt evni sum marknaðirnir leggja sera stóran dent á fyri tíðina. Tað elvdi tí til rembingar, at amerikonsku framleiðsluprísirnir fyri januar, sum vórðu kunngjørdir fríggjadagin, vóru nógv hægri enn væntað.

### Lánsbrøv lækka av prísvøkstri

Greenspan og hægri framleiðsluprísir í USA elvdu til hækkandi lánsbrævarentur á okkara leiðum í farnu viku. Hesa vikuna fer danska 10-ára rentan neyvan at nerta botnin á 3,51% (sí mynd). Tað er tó ivasamt, um renturnar í Evropa júst nú fara at hækka av álvara. Evran er aftur sterk, búskaparvøksturin er júst niðurmettur, og stórir íleggjarar hava enn tørv á longum lánsbrøvum.

### Oljupartabrøv standa seg væl

Roknskapurin hjá Hewlett-Packard var góður, men partabrøvini vóru støðug farnu vikuna. Norðurlond hækkaðu einans 0,2%. Í løtuni leggur møguleikin fyri hækkandi prísvøkstri nakað av trýsti á. Oljupartabrøv standa seg kortini væl. Hesa vikuna kunngera m.a. TDC, Nordea og Svenska Handelsbanken roknskap.

### Hesa vikuna

Prísvøkstur verður aftur á skránni hesa vikuna. Mikudagin fáa vit at síggja, um amerikanskar og týskar fyritøkur hava megnað at skumpa teir hægri framleiðsluprísirnar yvir á brúkararnar. Hetta hevur víst seg at vera trupult síðstu árini, í stóran mun orsakað av altjóðagerðini. Trýstið á marknaðirnar kann tí halda fram hesa vikuna.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,69 | -1,6% |
| JPY | 5,39 | -1,5% |
| GBP | 10,79 | -0,2% |
| NOK | 0,90 | 1,7% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,03 | -0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 172,68 | -0,6% |
| Norrøn Partabrøv | 89,15 | -0,4% |
| Altjóða Vøkstur | 61,36 | -0,4% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*